Fróðskaparsetur Føroya

30. november 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 10/2005

Tíð: Týsdagin 29. november 2005, kl. 13.00-14.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 9/2005 setursráðsfundi 27. oktober 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlóg 2006. Støðutakan til raðfestingar.** (J.nr. 0015-01595). Deildirnar bidnar um at endurskoða metingarnar av fíggjartørvinum fyri 2006. Setursskrivarin heitti á setursráðslimirnar um at fyrireika seg til at taka endaliga støðu á komandi ráðsfundi um, hvussu eitt møguligt fíggjarligt glopp kann brúkast, sæð í ljósinum av menningarætlanini.

4. **Samskipan av hægru útbúgvingunum. Fyrsta stigið verður at leggja Sjúkrarøktarfrøðiskúlan saman við Fróðskaparsetrinum 1. januar 2006.** (J.nr. 0010-01483). Eyka setursráðsfundur var um málið 23. november, har rektarin kunnaði um gongdina í málinum. Setursráðið tók avgerðina hjá Landsstýrismanninum til eftirtektar. Rektararnir báðir seta seg í samband við Mentamálaráðið fyri at avtala nærri, hvussu víðari verður farið fram.

5. **Umsókn frá Turið Sigurðardóttur um stuðul til útgávu av Setursrit 3, ið verður givið út í sambandi við, at 40 ár eru liðin, síðan Fróðskaparsetrið varð sett á**


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

**stovn.** (J.nr. 0015-01747). Setursráðið gekk ikki umsóknini á møti. Fróðskaparsetrið letur ikki stuðul til útgávur.

6. **Fíggjarmálaráðið biður Fróðskaparsetrið tilmæla limir í Búskaparráðið fyri tíðarskeiðið 1.1.06 – 31.12.08.** (J.nr. 0011-01742). Kjak um støðuna hjá Fróðskaparsetrinum sum tilmælari, nú so nógv umrøða er av arbeiðinum hjá Búskaparráðum og kvalifikatiónunum hjá ráðslimunum. Ásett í lóg at Fróðskaparsetrið skal gera tilmæli. Hevur Setursráðið fyrivarnir og viðmerkingar, skal gerast vart við hetta í skrivi til Fíggjarmálaráðið saman við tilmælinum. Rektarin og setursskrivarin taka sær av málinum.

7. **Val av vararektara fyri tíðarskeiðið 1.12.05 – 30.11.06.** (J.nr. 0011-01379). Eivind Weyhe valdur sum vararektari 1.12.05 – 30.11.06.

8. **Val av nevnd til *Grunn Johannesar og Gunhildar í Dalsgarði til frama fyri Fróðskaparsetur Føroya*.** (J.nr. 0073-00451). Nevndin er samansett av rektaranum og tveimum vísindastarvsfólkum í føstum starvi. Nevndin ikki vald síðani rektaraskiftið. Setursráðið samtykti at heita á verandi limir um at halda fram: Maluna Marnersdóttur, Turið Sigurðardóttur og Jóan Paula Joensen.

9. **Val av Trygdar- og Trivnaðarnevnd.** Setursskrivarin og Marjun Mortensen hava verið á trygdarskeiði og hava har fingið at vita, at Fróðskaparsetrið skal hava eina trygdarnevnd. Mælt verður til, at eitt umboð verður fyri hvørja deild, og at setursskrivarin umboðar leiðsluna. Uppskot frá setursskrivstovuni um at talan skal vera um eina trygdar- og trivnaðarnevnd, sum fær ábyrgd at skipa fyri starvsfólkatiltøkum sum hava samband við trygd og trivnað. Nevndin eigur at fáa eina upphædd avsetta til at skipa fyri tiltøkum. Samtykt. Deildirnar verða bidnar um at tilnevna eitt umboð sum skjótast.

10. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 4.11.05.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 14.11.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
    c. **Fundir á Føroyamálsdeildini 3.11.05 og 16.11.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

11. **KT-reglur at staðfesta:** (J.nr. 0038-01573).
    ***Reglur um nýtslu av KT-skipanum á Fróðskaparsetri Føroya 27.10.05***
    ***Felags leiðreglur fyri starvsfólk og lesandi fyri nýtslu av KT-skipanum á Fróðskaparsetri Føroya 27.10.05***
    ***KT-trygdarpolitikkur hjá Fróðskaparsetri Føroya 27.10.05.***
    Staðfestar.

12. **Tilmæli um limir og varalimir í Kappingarráðið fyri tíðarskeiðið oktober 2005 – oktober 2009 sent Vinnumálaráðnum. At staðfesta.** (J.nr. 0011-01723).
Staðfest.

**Kunningarmál:**

13. **Mánaðarjavni ultimo oktober 2005, nýtsla fyri alt setrið 14.653.900 kr = 76,8% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).

14. **Ársfrágreiðingin 2004 er komin og er send stovnum og einstaklingum.** (J.nr. 0018-01520).

15. **Rektararnir á Háskólanum á Akureyri og Fróðskaparsetrinum hava 9.11.05 skrivað undir ætlanarskriv um samstarv innan løgfrøði, KT-frøði og umhvørvisvísindi.** (J.nr. 0012-01743).

16. **Malan Marnersdóttir hevur fingið farloyvi tíðarskeiðið 9. mars – 9. juni 2006. Hesa tíðina skal hon vera á University of Washington í Seattle og ferðast til onnur universitet í USA at hava fyrilestrar.** (J.nr. 0022-00098).

17. **Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sett nevnd, sum skal endurskoða gymnisialu miðnámsútbúgvingarnar. Rektarin er tilnevndur limur í tilvísingarbólkinum.** (J.nr. 0011-01748).

18. **Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur tilnevnt rektaran í stýringsbólkin fyri bygging av Granskaraparkini.** (J.nr. 0011-01751).

19. **Útgávur:**

    a. **Ársfrágreiðing 2004, Fiskirannsóknarstovan.**
    b. **Jagten på det troværdige universitet. Muligheder og risici i fremtidens forskningskommunikation, Danmarks Pædagogiske Universitet.**

Frágreiðing: Annika Sølvará